DAGSINS MEINING

Merkisdagar

Í hesum døgum eru 10 ár liðin, síðani Atli Dam, táverandi løgmaður saman við samráðingarmonnum sum Halgir W. Poulsen og Árna Olafsson kundu geva føroyingum tey gleðiligu boð, at danska stjórnin varð gingin við til at lata Føroyar yvirtaka ráevnini í undirgrundini. Tað hevði við sær, at heimastýrið fekk allan lóggevandi og fyrisitandi myndugleika yvir møguligum ráevnum í undirgrundini. Hetta hendi eftir eitt drúgvt stríð millum føroyskar og danskar myndugleikar og politikarar. Hendingin var so mikið stór, at táverandi løgmaður skýrdi hana størstu politisku hendingina síðani Heimastýrislógina. Og fyri Atla Dam, sum er tann politikari, sum hevur sitið longst í løgmansesssinum, var hetta helst eisini ein hin størsta hendingin í politikki.

Tað er einki at taka seg aftur í, at hóast tað kom óvart á føroyingar, at Schlüter forsætisráðharri brádliga kúvendi og gav eftir fyri føroyskum krøvunum, so vóru tað ikki minst royndu og góðu samráðingarfólkunum við Atla Dam á odda, ið slóðaðu fyri eini loysn í hesum fyri Føroyar so týðandi máli.

Nú 10 ár eftir standa vit á einum vegamóti. Olja og gass eru staðfest í okkara undirgrund og verður nú kannað, um hesi eru í so mikið stórum nøgdum, at tað loysir seg at útvinna tey. Júst í hesum døgum, á 10 ára degnum fyri yvirtøkuna av somu ráevnum og á 70 ára føðingardegi Atla Dams, verður borað niður í undirgrundina fyri at finna tað svar, sum vit so leingi hava bíðað eftir og sett okkara álit á. Tað var jú nettupp ynskið um at fara undir at leita eftir olju og gassi og vónirnar til, at hetta tilfeingi fanst í føroysku undirgrundini, sum vórðu drívmegin aftanfyri samráðingarnar at fáa yvirtikið møguligu ráevni í undirgrundini. Tí er rætt í dag nú vit eru um at koma á mál at minnast aftur á umræddu hending fyri 10 árum síðani.

Tað eru eisini teir politikarar her á landi, sum hava roynt at niðurgera og gera til einkis umræddu avtalu við danir í 92. Og sum siga, at danir – um teir vilja tað – bara kunnu taka rættin frá okkum aftur. Men soleiðis sær veruleikin ikki út. Føroyingar eiga møguliga olju og gass eins væl og vit eiga fiskirikidømið, sum svimur í havinum kring okkum. Hesi tilfeingi eru okkara og vera verandi okkara.

Tað er eisini tí, at landsstýrið hevur kunnað gjørt avtalur við útlendsk oljufeløg um at leita eftir olju. Var nøkur óvissa um ognarrættin til hesa somu olju, so var als eingin leiting. Tvørturímóti var tað undirgrundaravtalan við danir frá 92, sum tók hesa forðing burtur. Brádliga kundu vit sjálvi taka avgerðir um hetta okkara »nýggja« tilfeingi. Tí vit áttu og eiga tað.

Tað áhugaverda við hesum degi er tó ikki bara sjálv yvirtøkan, men eisini tann sannroynd, at persónurin, sum var politiska drívmegin aftanfyri hesa yvirtøku, Atli Dam, í dag verður 70 ár. Tí kann sigast, at bæði hann og Føroya fólk hava nakað av hátíðarhalda í hesum døgum.

Sosialurin vil eisini nýta høvið til at ynskja Atla Dam hjartaliga tillukku við runda degnum og vóna vit, at eins stórhending tað var at fáa rávevnini yvirtikin fyri 10 árum síðani, eins stórhending kann leiting gerast, sum fer fram í hesum døgum

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Til Niels Una Dam (2)

Dánial á Dul Jacobsen

Sum áður sagt, so skilir tú helst ikki tað eg sigi, men vit royna aftur kortini.

Tali- og skrivifrælsi inniber, at vit mugu lata onnur sleppa til orðanna uttan at stempla tey svín og leggja tey undir líkt og ólíkt. Kunnu vit ikki halda okkum frá tí, so er tað í veruleikanum bert okkara egna tali- og skrivifrælsi vit elska og vilja verja.

Nú hevur í langa tíð verið lítið at hoyrt til Salman Rushdie, og tí kendist tað heldur løgið, tá eg dagin eftir at hava sent aftursvar (1), fekk norsku kristnu, vikuavísina Magazinet inn um dyrnar og lesi um nevnda Salman Rushdie í einum høpi, sum í ólukkumát líkist júst tí hugsaða dømínum:

Um nú Føroyar høvdu verið muslimskar. Magazinet skrivar um pakistanska Ayub Masih, sum nú, eftir at hava sitið fongslaður í 6 ár vegna kristnu trúgv sína er latin leysur og av ótta fyri viðgongdum muslimum loyniliga er fluttur til eitt vestanland.

Orsøkin til fongslingina vóru falskar ákærur. Ayub Masih var handtikin og dømdur til deyða, eftir at ein islamskur granni hjá honum ákærdi hann fyri at spotta profetin Muhammed. Grannin pástóð, at Ayub hevði lovprísað bókini hjá Salman Rushdie »Satanisk ørindi«. So Niels Uni, hetta er veruleikin, øðrvísi hugsandi mugu liva við aðrastaðni í heiminum. Tú ert helst ikki so óvitandi, sum tú letst.

Annars er tað ein onnur misskiljing, eg ætlaði at nerta eitt sindur við. Tað tykist, sum tú heldur, at sannleikin er ókristiligur, um hann særir. Tað er ikki so! Jesus fýrir ikki fyri at kalla mótstoðumenn sínar fyri bæði høggormar og ormaavkom. Tað er kortini lítið av miklum afturímóti tí, hann sigur við nærmasta lærisvein sín, Pætur. Nú plagar sjónvarpið at ávara, áðrenn teir sýna sterkar myndir. Tað er kanska best, tú setir teg, áðrenn tú lesir meira. Orð Jesusar vóru:

»Vík aftur um Meg, Satan! Tú ert Mær til ástoyt; tí tú hugsar ikki um tað, sum Gudi hoyrir til, men um tað, sum menniskjum hoyrir til!«

Hetta kann sjálvsagt virka bæði hart og dømandi, men Jesus segði eisini við lærisveinarnar at:

»…tit skulu skilja sannleikan, og sannleikin skal gera tykkum fríar.«

Tá tú fert til tannlæknan, og hann sigur tær, at tú hevur 15 hol í tonnunum, so sigur hann tað ikki fyri at vera harður og dømandi, men fyri at tú kanst fáa høvi til at fáa skaðan bøttan, og helst er hann noyddur til at særa teg, tá hann fer í holtur við tey. Pling!

Royn og lurta eftir Moses Hansen einaferð afturat. Tosar tú pent við Victor, so ivist eg ikki í, at hann útvegar tær upptøkuna frá nevnda »Víngarði«. Sjálvur kann eg útvega tær taluna hjá Moses, sum Lindin sendi, um tað er áhugi fyri tí.

Borgmeistarin og Bussleiðin

Jógvan Arge
Býráðslimur í Havn fyri Tjóðveldisflokkin

Sær út til, at borgarstjórin í Havn hevur gjørt sær til vana at argumentara ímóti minnilutanum í býráðnum á teimum tíðindafundum, sum hann heldur eftir hvønn býráðsfund.

Helt, at hann fór undir hesar fundirnir til tess at lata kommununa upp og at kunna borgararnar objektivt um tað, sum fer fram í býráðnum.

Brúkar hann fundirnar bara til at sæta sær og síni samgongu, hvur hann ikki skilt sín egna leiklut sum borgarstjóri fyri øll í kommununi.

Tann spurningin mugu vit í minnilutanum so taka upp og møguliga møta sjálvi á tíðindafundunum at greiða frá okkara sjónarmiðum.

Borgarstjórin vil vera við, at vit hava ligið sjóvarfallið av okkum í bussleiðarmálinum. Hetta er ein skuldseting, sum er tikin úr leysum lofti.

Vit hava verið væl umboðað í teknisku nevnd, sum hevur havt hetta málið í hálvtannað ár. Vit hava alla tíðina havt varhugan av, at samgongan og hennara umsiting onga ætlan hava havt um at menna Bussleiðina.

Tað, sum vit í minnilutanum sita eftir við frá hesum viðgerðum, er, at hugurin fyrst og fremst stóð til at skerja Bussleiðina og sleppa av við onkrar entreprenørar.

Tað gav eisini at bíta, tá útbjóðingartilfarið kom fram. Sunnudagurin skuldu leggjast burturúr, leygardagurin skuldi skerjast og gerandiskvøldini skuldu skerjast.

Vit mótmæltu øllum hesum skerjingum og skutu upp at gera útbjóðingartilfarið av nýggjum, so tænastan hjá Bussleiðini varð víðkað.

Tað fekk ikki undirtøku, men so mikið fingu vit kortini burtuúr, at sunnudagurin er komin upp á aftur skránna, og at gerandiskvøldini ikki eru skerd. Leygardagurin er enn skerdur tíanverri.

Nú tilboðini vóru komin inn, mæltu vit til, at kommununa brúkti í minsta lagi tær 3,4 milliónirnar, sum hon heldur seg spara, til at viðka tænastuna hjá Bussleiðini.

Hetta fekk ikki undirtøku og tessvegna eru útlitini, at Bussleiðin, sum verður løgd í ein sjey ára sáttmála, er niðurbundin alla hesa tíðina.

Sláast kann eisini fast, at atlitini til borgarnar, til ferðsluna og til umhvørvið hava ikki talt eitt vet í teirri loysn, sum meirilutin í Tórshavnar Býráð hevur valt.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari: Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjelbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Javnaðarflokkurin heilsar Atla Dam

Í dag 12. september fyllir Atli P. Dam, fyrrverandi løgmaður sjeyti

Hann er føddur á Tvøroyri 12. september 1932. Foreldrini vóru Ragnhild og Petur Mohr Dam, fyrrverandi løgmaður og ein av stovnarunum av javnaðarflokkinum og floksformaður í meira enn ein mannsaldur.

Tá Atli fyri 10 árum síðani fylti seksti vórðu millum annað hesi orð skrivað um hann: »Javnaðarhugsjónina seyg hann í seg saman við móðurmjólkini. Longu sum smádrongur og í uppvøkstrinum lærdi hann at telva við í tí politiska talvinum og seinni gjørdist hann stórmeistari í politiskum talvi. Áhugan fyri politikki og samfelagsviðurskiftum annars, eins og tey politisku evnini, tað framúr góða politiska hegnið, handalagið og samráðingarkynstrið, fekk hann í vøggugávu.«

Atli sleit sínar barnaskógvar á Tvøroyri. Har gekk hann í barnaskúlan og har tók hann realprógv. Seinni tók hann studentsprógv og í 1964 gjørdist hann maskinverkfrøðingur frá Danmarks Ingeniør Akademi. Í lestrartíðini starvaðist Atli eina tíð á maskinverksmiðjuni hjá Burmeister & Wain í Keypmannahavn og seinni arbeiddi hann sum verkfrøðingur í oljuvinnuni í Kuwait. Har var hann staddur tá javnaðarflokkurin í 1970 hevði boð eftir honum. Hetta hendi eftir at landsstýrismaðurin Villi Sørensen, sáli var deyður 2. januar 1970.

Atli kom heim í mars 1970 og tók beinan vegin við sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum og samferðslumálum. Hetta starvið røkti hann til nýtt landsstýri varð skipað 10. desember 1970 eftir at løgtingsval hevði verið í november. Á løgtingsvalinum í 1970 varð Atli Dam valdur løgtingsmaður. Hann varð valdur at umboða javnaðarflokkin í Suðuroyar valdømi. Har í valdøminum varð hann afturvaldur seks ferðir – øll løgtingsvalini til og við 1988. Á løgtingsvalinum í 1990 varð hann valdur at umboða javnaðarflokkin í Suðursteymoyar valdømi. Hann var sostatt valdur tingmaður í tilsamans 24 ár.

10. desember 1970 varð Atli Dam á fyrsta sinni valdur til løgmann. Í hesum fyrsta umfarinum sat hann sum løgmaður í 10 ár. Í tí næsta umfarinum gjørdist hann løgmaður 10. januar 1985 og sat til 18. januar 1989. 15. januar 1991 varð hann valdur til løgmann á triðja sinni og sat til 18. januar 1993 tá hann ynksti at leggja frá sær. Samanlagt hevur Atli Dam sostatt verið Føroya Løgmaður í 16 ár. Her er talan um eitt met, sum verður sera torfort, fyri ikki at siga heilt ógjørligt, hjá nøkrum at taka frá honum. So nógv ár í einum so týdningarmiklum og kravmiklum starvi, ber boð um bæði likamliga og sálarliga styrki.

Mangan breyt um bæði borð, men altíð stóð tú, Atli, bæði stinnur og sterkur. Uppgávulyndið var tær so fjart. Tú gavst ikki á hondum, men ótroyttiligur royndi tú heldur at rógva aftur á aftur, fyri at gera enn eina roynd at fáa eitt úrslit fyri Føroyar og føroyingar. Um ta tíðina, tá Atli Dam kom í politikk í 1970, stóðu politisku myndugleikarnir í Føroyum yvir fyri heilt nýggjum og sera stórum avbjóðingum. Hetta vóru torførar samráðingar við ymisk lond og ymiskar felagsskapir og eitt økt samskifti við útheimin. Fyrst á skránni stóð europeiski felagsskapurin. Skuldu Føroyar gerast limur ella skuldu vit hava eina handilsavtalu?

Næst á skránni stóðu samráðingar um sínámillum fiskiveiðusáttmálar við EF og ymisk lond, har føroyingar høvdu áhugamál. Í fyrstu atløgu ráddi um at gera rammusáttmálar. Umframt EF, vórðu rammusáttmálar gjørdir við táverandi Sovjet, Noreg, Svoríki, Pólland, Eysturtýskland, Ísland, Kanada og USA. (Føroyar vóru annars fyrsta land í vesturheiminum, ið gjørdi handilssáttmála við Sovjet.) Sjálvur stóð tú, Atli, á odda í hesum samráðingum. Í nógvum førum vóru samráðingarnar bæði truplar og torførar. Men við tínum samráðingarkynstri og tínum gløgga viti, megnaði tú altíð at telva talvið soleiðis, at vit fingu tað best møguliga úrslitið fyri Føroyar og føroyingar. Sum samráðingarleiðari umboðaði tú altíð føroysk áhugamál til lítar.

Á mangan hátt kann verða sagt um hetta tíðarskeiðið, at her var veruliga talan um førleikamenning í verki. Føroysk umsiting og føroysk fyrisiting vann sær førleika at fyrisita nýggj málsøki á uttanríkispolitiska økinum. Føroyar vórðu settar á heimskortið sum ongantíð áður og heldur ongantíð síðani. Tað føroyska politiska rúmið vaks í stóran mun. Og fyrst og fremst var tað víðskygni hjá Atla Dam, sum var drívmegin í hesi menning. Her varð brotið burtur úr nýggjum. Og tað skylda vit Atla eina stóra tøkk fyri.

Tað, at Atli Dam í dag fyllir 70, gevur okkum høvið til at hugleiða um, hvat hendi um tað mundið, tá hann fyri 10 árum síðani rundaði tey seksti. Tá sat hann við samráðingarborðið í danska forsætismálaráðnum, har hann royndi at vinna okkum ognarrættin til ráevnini í føroysku undirgrundini. Og sjálvan føðingardagin komu stóru tíðindini úr Keypmannahavn: Vit høvdu vunnið ognarrættin, lógávuvaldið og umsitingarrættin yvir ráevnunum í føroysku undirgrundini. Hetta var krúnan á verkið.

Eftir tógvið stríð í fleiri ár hevði Atli vunnið talvið um ognarrættin til ráevnini í undirgrundini. Hetta var eitt av tínum stóru hjartamálum. Eitt annað var at loysa trætuna millum Føroyar og Bretland um undirgrundamarkið. Meðan Atli Dam var løgmaður varð skjøtil settur á hetta arbeiða og eftir tógvið stríð í fleiri ár eyðnaðist umsíðir at fáa eina semju, sum er nøktandi fyri Føroyar, og tí kunnu vit nú fara undir oljuvinnu í føroysku undirgrundini.

Sum samráðingarleiðari í meira enn 20 ár vann Atli sær stóra virðing í útheiminum. Virðing millum útlendskar politikkarar og útlendskar embætismenn. Millum hesar var Atli Dam høgt í metum. Her heima høvdu politikkarar úr øllum flokkum stóra virðing fyri tær. Politikkarar úr øllum flokkum vistu, at hjá Atla Dam var ein maður ein maður og eitt orð var eitt orð, t. v. s. at var ein avtala gjørd, har tú og javnaðarflokkurin vóru annar partur-inn, so varð avtalan í øllum førum hildin frá okkara síðu.

Í meira enn 20 ár var Atli Dam formaður í Føroya Javnaðarflokki. Tá flokkurin var í andstøðu frá 1981 til 1985 var hann fíggjarnevndarlimur. Í andstøðutíðarskeiðnum 1989 - 90 var hann limur í Norðurlandaráðnum. Á fólkatingsvalinum í 1988 varð hann valdur fólkatingsmaður og hann varð afturvaldur á fólkatingsvalinum í desember 1990, men við tað at hann í januar 1991 aftur tók við løgmansstarvinum, lat hann fólkatingssessin frá sær til næstvalda umboðið á javnaðarlistanum, sum var Jacob Lindenskov.

Tey seinastu gott og væl 20 árini hevur Atli Dam eisini havt eitt borgarligt starv. Tá hann fór frá sum løgmaður í 1981 fekk hann tilboð um at gerast dagligur leiðari á Realkredittstovninum. Hann tók av tilboðnum og hevur røkt hetta starv við undantak av árunum 1985-89 og 1991-93 tá hann aftur var løgmaður. Atli hevur altíð havt ómetaliga stóran áhuga fyri skipum og fiskiskapi. Lutvíst er hesin áhugin helst mentur í ti politiska arbeiðnum. Tað hevur givið honum góðan førleika at røkja starvið sum dagligur leiðari á Realkredittstovninum. Nú Atli Dam rundar tey sjeyti situr hann framvegis í hesum starvi.

Føroya Javnaðarflokkur og javnaðarflokkurin á tingi heilsa tær og ynskja tær hjartaliga tillukku við 70 ára degnum. Vit føla stóra trongd til at takka tær fyri títt ágrýtni og títt áhaldandi stríð fyri javnaðarflokkin og javnaðarhugsjónina. Hollur í ávikum. Ótroyttiligur, og ongantíð spardi tú teg sjálvan, men setti altíð hugsjónina fram um alt, við tí fyri eyga at skapa eitt gott samfelag – FÓLKAHEIMIÐ FØROYAR – eitt vælferðarsamfelag, har fá hava ov nógv og færri hava ov lítið.

Hjartaliga tillukku og alt gott í framtíðini. Hendan heilsanin verður eisini send konu tíni, Sólvá, sum hevur verið tær ein dyggur stuðul, og til børnini og næstringunum annars.

Við javnaðarkveðu

Føroya Javnaðarflokkur og Javnaðarflokkurin á Ting